# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*18. juli fekk Magnus Eiler eina lítla systur. Hon var 51 cm long og vigaði 4500 gr. Mamma og pápi okkara eita Beinta Karina Magnusdóttir og Fróði Rubeksen, Hvannasund.*

1. juli fingu Tina Ryom Jensen og Per Zachariassen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

11. juli fingu Marita Reinert og Rúni Mohr, Keypmannahavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 3980 gr.

13. juli fingu Rutt Leo Skarðenni og Petur Hansen Skarðenni, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3510 gr.

15. juli fingu Annbritt Toftegaard og Fróði H. Poulsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4250 gr.

16. juli fingu Doris og Jóannes Djurhuus, Søldarfirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

16. juli fingu Marna Hansen og Jóhann Páll Christiansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3450 gr.

17. juli fingu Eva Brekkskin og René Hjaltalin, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3800 gr.

18. juli fingu Susan og David Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 4500 gr.

19. juli fingu Maria Heradóttir og Tórhallur Nolsøe, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4000 gr.

20. juli fingu Birgit Haraldsen og Karstin S. Wang, Kvívík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

21. juli fingu Karin Hüssy og Uni Wang Hansen, Birkerød, ein son á Hillerød fødeklinik. Hann vigaði 4320 gr og var 55 cm langur, bæði foreldrini og stórasysturin Kanya er ikki sørt stolt.

21. juli fingu Mari og Hendrik Olsen, Lamba, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4950 gr.

21. juli fingu Sólva og Anton Højgaard, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4300 gr.

KVIKKKEYP

Søkt verður eftir fólki til kvøld- og vikuskiftisvaktir. Helst yvir 18 ár at byrja sum skjótast.

Ring 51 24 80

## Brúdleyp

Í dag, 24. juli, kl. 16.00 giftast í Argja kirkju Eyðna Jensen úr Skopun og Hans Eivind Olsen av Argjum. Veitslan verður fyri innbodnum í Rórðarneystinum á Argjum kl. 19.00.

Í dag, 24. juli, giftast Gurið Samuelsen og Ivan E. Moskalenko. Vígslan verður kl. 14.00 í Haldarsvíkar kirkju. Opið hús er heima í Haldarsvík frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 24. juli, giftast í Vatnsoyrum Charlotta Djurhuus, Porkeri, og Dánjal Petur Nielsen, Klaksvík. Vígslan verður í Zarepta klokkan 16.00. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Vágum. Aftaná vígsluna verður móttøka, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 24. juli, giftast Sanna á Løgmansbø og Ingi Joensen bæði úr Miðvági Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 14.00. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Miðvági eftir kl. 21.00.

Í dag, 24. juli, giftast í Trongisvági Wenche F. Lindberg, Trongisvágur, dóttur Óla Jákup Lindberg, og Rúni Aarethún, Fana, Norra. Veitslan verður fyri innbodnum inni á Sandinum hjá Jonnu og Óla Jákupi Lindberg, Trongisvágur.

Í dag, 24. juli, giftast í Lellinge kirke Guðrun Heðinsdóttir Mikkelsen og Kenneth Hansen. Adressan er Grønnevej 44, Lellinge, 4600 Køge.

Í dag, 24. juli, kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Gitte Johannesen og Finnur Klein. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

Í dag, 24. juli, giftast í Prestagarðinum á Sandi Tania Ørvarodd av Sandi og Gunleif Bjartalíð úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum í Slavandsdali. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru hjartaliga vælkomin í heimið eftir kl. 18.00.

Í dag, 24. juli, giftast í Uggerby Kirke Janet Grønborg, Uggerby og Hans Davidsen, Tórshavn. Brúdleypsadr. Uggerhøjvej 17, Uggerby, 9800 Hjørring.

Í dag, 24. juli, kl. 13.00 giftast í Ebenezer Winnie Torsteinsson Djurhuus, Tvøroyri og Jens Sigurð Simonsen, Tórshavn.

Í dag, 24. juli, giftast í Nr. Galten Kirkju Bergfríða Hansen, Sandavágur og Søren Moltke Anderes, Hadsten.

Í dag, 24. juli, giftast Johild Nolsøe og Petur Jóhannesen, Argir. Dagurin verður hildin heima saman við familjuni.

## Agnar og Stamen í Pakkhúsinum

**Forvitnislig konsert verður í Stóra Pakkhúsi í Vági sunnudagin**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Sunnudagin 25. juli verður konsert í Stóra Pakkhúsi í Vági. Tað er ein samanseting, ið ikki hevur verið frammi so ofta, ið fer á pall.

Agnar Lamhauge kenna vit sum dugnaligan bassleikara í bólkinum Enekk og Stamen Stantchev hevur langt síðani sett sær varðar í føroyskum tónleiki. Men saman hava hesir úrmælingar ikki verið ofta at hoyra, men nú er møguleikin har. Klokkan 20 sunnukvøldið framføra teir í Vági og á skránni eru egin løg og egnar kompositiónir.

## Dagurin

**24. juli, Kristin.** Eftir halgisøguni er talan um eina ellivu ára gamla gentu, sum verður tikin av døgum, av tí at hon breyt nakrar skurðgudamyndir og gav teimum fátæku gullið og tað dýra tilfarið, tær vóru gjørdar av. Annars hava tvær halgar kvinnur 24. juli sum minningardag, Sankta Kristina úr Týrus og Sankta Kristina úr Bolsena.

**25. juli, Jákupsdagur.** Dagurin verður hildin til minnis um tann ápostulin, sum verður róptur *Jákup tann Eldri.* Hann var sonur Sebedeusar og bróðir Jóhannesar. Hann var tann fyrsti av ápostlunum, sum varð tikin av døgum fyri trúgv sína (Ápostlasøgan 12, 1–2).

Halgisøgan sigur frá, at fyri deyða sín hevði Jákup verið ferð í Spaniu, og har varð hann eisini jarðaður. Vælt verður um bein hansara í kirkjuni Santiago de Compostela í Galisiu í Norðurspaniu. Henda kirkjan var ein av teimum støðunum, har flestir pílagrímar vitjaðu í miðøldini. Jákup sjálvur er eisini ofta avmyndaður sum pílagrímur, m.a. træskurðurin av honum á einum av kirkjubøstólunum; har sæst hann við pílagrímsstavi í hendi og undir hatti, sum er prýddur við tí skelini, sum í Føroyum fekk navnið jákupsskel.

Eisini er eitt føroyskt kvæði um, tá ið hann skal kristna Garsialand, ið er føroyska navnið á Galisiu í Norðurspaniu:

*Santa Jákup tekur í Várharra hond:*
*– drívur døgg, fellur nú ríman –*
*tú Lova mær at kristna Garsialand.*

Týdningurin av navninum Jákup er ókendur, men teir halda, at tað upprunaliga kemur av einum orði, ið merkir *Guð verjir.* Bíbilsku frásøgurnar siga, at hann er tann, sum lumpar tvíburabróður sín Esau: tá ið teir vóru føddir *helt hann um hælin* á bróður sínum; og eisini verður sipað til, at hann vann sær frumburðarrættin frá Esau fyri ein ertnastamp, og at hann lumpaði signingina frá faðirinum.

**26. juli, Anna.** Hon var móðir Mariu Moy og var gift við Jójakimi. Halgisøgan sigur frá, at tey komin upp í árini eingi børn fingu, og Jójakim rýmdi frá konuni. Men hann vendi heim aftur, tá ið ein eingil hevði boðað honum, at tey skuldu fáa barn. Og tá bar til.

Hebráiskt navn, ið merkir *hin náðaða* ella *yndi.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Alfred Lambastein 85 ár



Í dag, leygardagin 24 juli, fyllur Alfred Lambastein úr Fuglafirði, búsitandi í Havn, 85 ár.

Alfred er sonur Jacobinu og Sámal í Lambanum , og tey vóru 10 systkin , og eru tað bara Alfred og Amy eftir.

Alfred arbeiddi í nøkur ár í Piddasahandil (Riberhus), hann sigldi eisini við eingilskum trolarum og føroyskum sluppum. Var í Grønlandi (Sukkertoppen) har hann arbeiddi á einum flakavirki. Kom so heim aftur og byrjaði at arbeiða á Handils & Frystivirkinum, har hann var til tað stongdi.

Alfred giftist 26/10-1940 við Astrid, dóttir Amaliu og Fredag Petersen. Tey fingu tvey børn, Tummas og Sólborg.

Tummas er giftur við Sonju, og tey eiga 3 børn. Alfred, Jóna Astrid og Svanna.

Sólborg er gift við Simma, og tey eiga 4 børn, Leivur, Asbjørn, Borgar og Estir.

Leivur eigur dótrina Tove.

Alfred bleiv einkjumaður í 1983. Hann býr nú í Havn saman við Annu Jacobsen slektað úr Byrgi í Søldarfirði, hon er dóttir Hansinu og Sámal Erik Djurhuus, Gjaranes. Hon bleiv einkja í 1983.Tey móttust á tí væl umtókta ballinum, sum Skipafelagið hevði á Kambsdali.

Tey, ið vilja gleða Alfred á hansara føðingardegi, eru hjartaliga vælkomin í Lonina í Fuglafirði klokkan 19.00.

## Hans Johannes á Brúgv stjóri í Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum



Mentamálaráðið hevur sett Hans Johannes á Brúgv í starvið sum stjóra í Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum. Hesir báðir skúlar verða eftir avgerð landsstýrismansins lagdir saman í ein felags stovn í næstum.

Hans Johannes á Brúgv er 41 ára gamal og hevur skipsførara- og skiparapróv. Harumframt hevur hann fleiri skeið m.a. í leiðslu.

Frá 1981 til 1988 var Hans Johannes á Brúgv við trolara, ein part av tíðini sum stýrimaður. Í tíðarskeiðnum frá 1991 til 2002 hevur hann verið í ymiskum leiðandi størvum í P/F Faroe Seafood, seinastu fimm árini sum stjóri. Hann starvaðist sum stjóri í felagnum FarMar í Spanien frá 2002 til 2003. Síðani 2003 hevur hann verið stjóri í O. C. Joensen á Oyri.

Hans Johannes á Brúgv hevur verið formaður og nevndarlimur í fleiri vinnuligum feløgum bæði her heima og uttanlands.

## Summarmótasýning 2004

TÍÐINDASKRIV
*frá Kunningarstovuni vegna handlarnar í miðbýnum*

Leygardagin 24. Juli kl. 14.00 skipa handlar í miðbýnum saman við Havnar Fimleikafelag fyri mótasýning.

Á sýningini verður tað nýggjasta innan móta sýnt fram. Sýningin verður fjølbroytt, alt frá innast til uttast, klæðir til børn, ung og vaksin.

Luttakandi handlar eru: Alv, Bamsan, Fótbúni, Fljóðið, Kallkyn, Kissa, Línbúðin, Mótaskálin, Siri, Sirri, Skálabúðin, Snældan, Thomas Dam Ítróttur, Touché, Vogue, Wrangler shop og X-Size.

Kl. 13.30 og í steðginum undirhalda Angela og Hannibal.

## Kristnastova á bryggjuni ólavsøkuaftan



Í Keypmannahavn verður Ólavsøkan á fyrsta sinni á Norðuratlantsbryggjuni, sum er nýggja mentanarhúsið hjá føroyingum, íslendingum og grønlendingum í Keypmannahavn.

Ymisk tiltøk fara fram í tí umbygda pakkhúsinum hesar dagar, sum eru lýst aðrastaðni. Men eins og á Ólavsøku heima í Føroyum vera eisini kristiligir tónar at hoyra. Kristnastova, sum eins og Norðuratlantsbryggjan heldur til úti á Amager, skipar fyri sangløtu Ólavsøkuaftan kl. 19.30. Hetta verður ein løta við felagssangi, har høvi verður at syngja gamlar, kendar sangir, ið fólk hava hoyrt heima í Føroyum. Men eisini verða einstakir solosangir bornir fram av fólki, sum plaga at luttaka í Kristnastovu.

Fyrireikararnir av sangløtuni vóna at fólk fara at hyggja inn í hølið á 5. hædd, har sangløtan verður.

## Fisk og list í Losjuni á ólavsøku

TÍÐINDASKRIV

Akvariufelagið sýnir fram á ólavsøku og eisini verður brúkslist, ið Torgerð Suðuroy ger, á einum bási. Akvariufelagið hevur í nøkur ár sýnt fram á ólavsøku. Í ár fer Torgerð Suðuroy at hava ein bás á sýningini, har hon sýnir fram brúkslist. Hon er von at taka lut á sýningum og sølustevnum og í fleiri ár hevði hon eisini sýnt brúkslist á ólavsøku, og kenna mong lutirnar, ið hon evnar til, frá básinum á Áarvegnum á ólavsøku. Men í ár er hon at finna í Losjuni, Tinghúsvegur 18, og opið er frá kl. 14 til 18 frá 28. til 31. juli.

## Andlát

14. juli
Elsubeth Maria Holm Jacobsen, vanliga nevnd Ebbemia, Tórshavn, 89 ár.

15. juli
Beinta Biskopstø, 68 ára gomul.

16. juli
Schønning Jensen, Hvalba, 82 ár
Oluf Dam, Sandav., búsitandi í Havn, 78 ár
Ella Hermansen, Tvøroyri, búsitandi í Havn, 86 ár

17. juli
Mourentza Hansen, Sandavági, 94 ár

18. juli
Jana Jacobsen, Heimaratún, 91 ár
Bolette Müller, búsitandi á Argjum, ættað úr Sukertoppinum, 63 ár

19. juli
Knút Sigurskjold Ellingsgaard, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Leirvík, 66 ár.
Jóhanna Jacobsen í Hvalba, 77 ár.
Margith Hansen í Klaksvík, 74 ár.
Jóhan Marius Johannesen, vanliga nevndur Hanne, Norðskála, 83 ár.

20. juli
Símin Mikkelsen, Klaksvík, 85 ár.
Albin Jacobsen í Vatnsoyrum, 76 ár.
Hanna Thomsen úr Havn, 69 ár.

## Tøkk

Eina stóra tøkk senda vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu, tá elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Johan á Plógv**

doyði og varð jarðaður

Tøkk fyri blómur og kransar, og takk fyri gávur til Meinigheitshúsið

Somuleiðis takka vit hjartaliga tykkum, sum hjálptu til í sambandi við jarðarferðina.

*Famil unnar vegna*
*agnhild*
*ohnfinn, ar un, tli og ibritt*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá ið elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Hanna Súsanna Binderup**

andaðist og varð jarðað

Ein serstøk tøkk til tykkum, ið vóru um mammu.

**Lis, Henry og Súsanna**

## 85 ár

Í dag, 24 juli,verður Alfred Lambastein. Fuglafirði 85 ár. Dagurin verður hildin í Lonini í Fuglafirði kl 19.00.